

Nýtt stórt úrval av trúlovilsis- og giftingarringum.
3 arin
Ur- & Smúkkudeildin tel. 35 35 31 · e-mail: 3-arin@3-arin.com

Internet
Sosialurin
www.sosialurin.fo



## Handilslærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til handil okkara at byrja skjótast tilber, tó kunnu vit bíða eftir tær, um tú verður liðugur í handilsskúlanum nú.
Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðslu, útkoyring og bílegging av vørum og goymsluhald v.m.

Tað er eitt krav, at tú hevur koyrikort og HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Partur av lærutíðini gongur fyri seg í skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki er bangin fyri at arbeiða sjálvstøðugt og taka eina ábyrgd.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær spennandi lærutíð við nógvum spennandi avbjóðingum, sum tú kann hava stóra gleði av seinni í lívinum.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi kunnu tit ringja til okkum á tlf. 311071.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til okkum í seinasta lagi 22.07.02.

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

**Miele**
DUSTSÚGVARIR

| S 251-1i | S 511-1 | S 518-1 | S 612 |
|---|---|---|---|
| 1400 Watt. Royal Blue | 1600 Watt. Mint Green | 1600 Watt. v/ serligum filtri til viðkvæmið. Royal Blue. | 1600 Watt. v/ 13 m. leidning. Carmina Red. |
| Vanl. prísur 1990,- | Vanl. prísur 2550,- | Vanl. prísur 2990,- | Vanl. prísur 3330,- |
| 1.645,- | 2.295,- | 2.695,- | 2.995,- |



Elkeyp
HTH Køksmiðstøðin
Á Hálsi • FO-100 Tórshavn • Tel. 31 49 49 • Fax 31 13 30

## Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá 22. juli til og við 16. august 2002.

**Annfinn V. Hansen**
Advokatur
Bryggjubakka 22
Postsmogu 22
110 Tórshavn
tel. 35 95 95, telefax 35 95 96

## Heimarøktin øki 5 Suðuroy

Vegna barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir **heilsuhjálpara** í tíðarskeiðnum 26. august 2002 til 10. mars 2003.

Nærri upplýsingar um starvið fáast hjá økisleiðaranum tlf. **373907**.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi verður at senda til.

**Heimarøktin**
Økisskrivstovan
900 Vágur

Umsóknarfreist 9. augst 2002.






## Pedagogur ella hjálparfólk

**til Bústovnin á Mýrivegi, Klaksvík**

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Bústovninum á Mýrivegi 13A er eitt pedagogstarv leyst til setan 1. august 2002 ella eftir nærri avtalu.

Starvið verður sett sum tænastumannastarv eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og F. Pedagogfelag, lønt lønarstigini 24, 25, 27, 28, 30 og 31 eftir lønartalvuni frá mars 2002. Arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna, skiftandi vaktir og annaðhvørt vikuskifti.

Á bústovninum búgva 4 børn/ung við sjúkragreiningini autismu. Endamálið við okkara arbeiði er at skapa tryggar karmar hjá íbúgvunum og at seta í gongd og skipa fyri virksemi, sum er til gagn fyri hvønn einstakan.

Umráðandi er at umsøkjarin er væl fyri kropsliga, er áhugaður í at verða nógv úti í náttúruni, svimja o.a. Somuleiðis hevur tað týdning at umsøkjarin hevur góð samstarvs- og innlivingarevni.

Av tí at Bústovnurin er nýggjur og tí undir uppbygging, kunnu vit bjóða eitt spennandi arbeiði, við nógvum avbjóðingum bæði persónliga og fakliga.

Bert fólk, sum hava lokið námsfrøðiligt prógv, kann setast í pedagogstarvið, men um ikki útbúgvið fólk verður sett, verður fólk við øðrum førleika sett í tíðaravmarkað starv.

Nærri fæst at vita um starvið frá leiðaranum á telefon 456310. Umsøknarfreistin er 27. juli 2002 og skulu umsóknirnar, saman við prógvum, viðmælum v.m. sendast til

**Bústovnin á Mýrivegi**
Mýrivegur 13 á
700 Klaksvík

## Bilur til sølu



Merki: Fiat Scudo 1,9 TD van.
Typa 222
Skrásettur fyrstu ferð: febr. 2001

Bilurin er í sera góðum standi. Við í keypinum eru felgur v/ píkadekkum á. Bilurin hevur koyrt 39.000 km og verður seldur fyri 150.000 kr. v/ mvg.

**Signar Olsen**
Tlf. 375222 / 220528

## Frá Almannastovuni

**SUMMARFRÍ**

Í vikunum 30 og 31 - t.v.s. frá 22/07 til og við 2/08-2002 hevur Almannastovan vegna summarfrí bert bráfeingistænastu.

Á høvuðsdeildini í Tórshavn eru telefonin og avgreiðslan opnar hvønn dag millum kl. 10.00 og 12.00, meðan deildirnar á Tvøroyri, í Runavík, Klaksvík og Hjálpartólamiðstøðin hava opið fyri telefonavgreiðslu somu tíðir.

Frá mánadegnum 5. august 2002 eru Almannastovan, allar deildirnar og Hjálpartólamiðstøðin opnar aftur sum vanligt.

**Almannastovan**
**og Hjálpartólamiðstøðin**

## Pedagogar

**til Bústovnin og Sambýlini í Runavík**

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við fyribils tænastu á Bústovninum og Sambýlunum í Runavík, eru tvey pedagogstørv leys at søkja til setan 1. aug. 2002 ella eftir nærri avtalu.

Størvini verða sett sum tænastumannastørv eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, fyri tænastumanna lønt stigini 24–31 eftir lønartalvu pr. 01.03.02.

Á Bústovninum á Rúnarvegi búgva seks menningartarnað fólk og á Sambýlinum á Rúnarvegi koma eisini 6 lættari menningartarnað fólk at búgva. Harumframt hoyrir Sambýlið á Líknagøtu 1 eisini til stovnin. Uppgávan hjá starvsfólkunum, sum nú verður søkt eftir, verður at hjálpa og vegleiða íbúgvarnar á Sambýlinum á Rúnarvegi í øllum tí, sum tey hava tørv á. Tit fáa við tykkara pedagogisku vitan ábyrgdina av at menna íbúgvarnar m.a. til at húsast saman í felagsskapi hvør við annan.

Arbeiðið á einum slíkum sambýli krevur áræði og fleksibilitet og at tú setur teg føran fyri at menna íbúgvarnar til bæði innanhýsis viðurskifti og at klára seg úti í samfelagnum.

Vit vilja at tú saman við okkum vil innrætta og skapa sambýlið til eitt heim, soleiðis at vit øll trívast og á ein pedagogiskan hátt tryggjar at okkara menningarmøguleikar koma í fyrstu røð, og finna útav saman, hvussu innihaldið í gerandisdegnum skal virka.

Vit vilja eisini, at tú skal hava samskifti við okkara avvarðandi og tey, sum vit umgangast dagliga. Starvsøkið er allur stovnurin, og tann setti kann rokna við at kunna fáa aðrar uppgávur aðrastaðni í skipanini, um tørvur gerst á tí.

Ert tú áhugaður í at uppbyggja og seta í verk og ganga nýggjar leiðir, so send eina umsókn við avriti av prógvum innan 24.07.2002. Eru spurningar til starvið, kunnu tit venda tykkum til leiðaran á tlf. 448424.

Umsóknir skulu stílast til:
**Sambýlið á Rúnarvegi**
Att.: leiðarin
Rúnarvegur 3
FO-620 Runavík

HG
TRANSPORT
Tlf. 470 470
Fax 470 479
Vøruvognskoyring
við lítlum og stórum vøruvognum
og kølibilum við lift

HESTPRENT

BØKUR, BØKUR, BØKUR
og alt annað prent

## Sethús á Kambsdali

119 $m^2$ til sølu. Grundøki 697 $m^2$. Byggiár: 1989.

**Tlf. 444187 ella 253987**

veitst tú ikki tað?
Sosialurin